### Fuglfirðingar røða og seta

**Fundir:** Eins og vanligt er verður varmakeldan sett leygardagin kl. 14.

Byrjað verður við eini skrúðgongu av fótbóltsvøllinum oman til Mentanarhúsið, har setanin verður. Í ár verður tað mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, ið sjálvur er ættaður haganі sum setir stevnuna.

Á sama staði verður eisini ein annar fundur - eina fólkafundur - hildin um nøkurlunda somu tíð dagin eftir.

Sunnudagin kl. 14:30 verður nevniliga ein fólkafundur hildin á økinum oman fyri Mentanarhúsið, har ein annar fuglfirðingur, Frits Johannesen fer at halda røðu og hornorkestrið í býnum fer at spæla.

**sb.**

### Bocciakapping uttan fyri Mentanarhúsið

Bocciakapping verður uttan fyri Mentanarhúsið leygardagin 2. juli kl.14.30.

Boccia er eitt sera nógv spælt spæl í Italia og hevur sín uppruna í teimum grisku kúlukastleikunum. Boccia verður spælt á einum avmarkaðum vølli, uml. 2,5 metur breiður og 18 m langur. Endamálið við spælinum er, at hvør luttakari fær sínar kúlur so nær málkúluni sum gjørligt

6 luttakarar frá ÍSB og 6 kendir fuglfirðingar fara at kappast í blandaðum liðum. Fuglfirðingarnir eru Sigurd Simonsen, Jógvan á Lakjuni, Durita Djurhuus, Sunrid Traðará, Frits Jóhannesen og Elisabeth Eldevig.

### Mexikansk uppboðssøla

Beint aftan á Nósaprixfinaluna verður mexicansk uppboðssøla á plássinum oman fyri Mentanarhúsið.

Mexikansk uppboðssøla er ein uppboðssøla, har fólk lata eina 20 krónu í ein peningakistil, meðan ein klokka gongur í ávísa tíð. Til ber sjálvandi fleiri ferðir at leggja 20 krónu í kistilin. Tann seinasti, ið hevur lagt 20 krónu í, innan klokkan ringir, fær vinningin. Vinningurin á hesari uppboðssøluni er eitt lamb.

# Eitt skýli til fótbóltin



*Higartil hava áskoðararnir verið noyddir at standa fram við vøllinum ella uppi á vegnum omanfyri vøllin. Áðrenn 1. januar 2007 er ætlanin at gera eitt skýli í ovaru síðu, til í minsta lagi 300 áskoðarar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**UEFA hevur sett krav fram um at øll lið í bestu deildunum skulu hava skýli til áskoðarar sínar. Hetta kravið ætla fuglfirðingar sær eisini at fylgja**

FÓTBÓLTUR
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Tey, ið hava verið til dystir í býnum, hava helst mangan ynskt sær eitt skýli, har tey kundu sett seg niður undir einum dysti.

Hesin møguleikin hevur ikki verið til staðar, og tí hava áskoðararnir higartil verið noyddir at staðið uppi framvið vøllinum teir 90 minuttirnar, ið dystirnir vara.

Men frá 1. januar 2007 er liðugt við tí: UEFA krevur nú nevniliga, at øll liðini í bestu deildunum skulu hava eitt skýli til áskoðarar, har í minsta lagi 300 fólk fáa sitið.

- Og hetta kravið ætla vit eisini at fremja her í býnum, sigur Signar á Brúnni, formaður í mentanarnevndini í Fuglfjarðar býráð.

### Vøkur laðing

Vøllurin í Fuglafirði er eftir Signarsa meting ein sera vakur vøllur.

Fyri mongum árum síðani varð hann laðaður upp við gróti, og fyri tey, ið hava eyga fyri slíkum, man tað vera einki minni enn ein frægd at síggja hesa ótrúliga vøkru laðingina á ymsum støðum kring vøllin.

- Hetta arbeiðið er so væl úr hondum greitt, at her er einki sjunkað øll hesi árini, sigur hann.

Nú skal so enn eitt stig takast í at útbyggja vøllin, og er ætlanin at hetta kravda skýlið skal setast upp við laðaða bakkan í ovaru síðu.

Tekniska umsitingin í býráðnum er longu farin undir at fyrireika hetta málið. Og fyri tey hevur tað størsta týdning, at hesin vakurt laðaði bakkin ikki verður oyðilagdur av hesi orsøk.

Arbeiðið skal haraftrat leggjast soleiðis til rættis, at fólk sum standa fram við vegnum í erva, eisini kunnu síggja leikararnar á vøllinum.

- Vit miða so eftir at gera arbeiðið liðugt næsta ár, og at peningurin tí verður játtaður til hetta á fíggjarlógini fyri 2006, sigur Signar á Brúnni.

So er bert eftir at vóna, at 1. deildarliðið hjá ÍF framhaldandi verður við í bestu mansdeildini í fótbólti.

# Eitt ellisakfar út í sólina

BILAR
*Snorri Brend*

**Fuglafjørður:** Í góðveðrinum mánadagin sást ein rættiliga forkunnugur bilur koyra í býin - ein Volvo Amazon frá 1967.

Tað er Jákup Frants Larsen sum eigur henda bilin, og sum hann ognaði sær fyri fimm árum síðani úr Danmark.

Bilurin er í góðum standi. Hann hevur bert havt ein annan eigara, og hevur einans koyrt 92.000 km. hesi sløku 40 árini.

Hesa seinastu tíðina hevur hann verið til eina yvirháling hjá Bilaumvæling í Havn, og fyri tveimum vikum síðani var hetta arbeiðið liðugt.

Hetta er tó ikki ein bilur, sum Jákup Frants ætlar at brúka gerandisdagar, men tá sólin skínur, eins og henda góðveðursmánadagin í Fuglafirði.

Umframt henda Volvobilin eigur hann eisini ein 34 ára gamlan Ford Taunus, sum verfaðir hansara upprunaliga átti. Hesin bilurin, ið stendur í bilhúsi í Oyndarfirði, er eisini í góðum standi, og her sæst ikki rust-blettur á.

Og jú, sum vituligt er, er Jákup Frants eisini limur í felagnum Ellisakfør. Tað hevur hann verið í eini 10 ár.



*Skjótt 40 ára gamli Volvo Amazonurin tekur seg væl út í summarveðrinum í Fuglafirði mánadagin. Slíkar dagar kemur bilurin út úr bilhúsinum - annars ikki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*